Bjørg Mohr Anderssen:

# Fyrsti kvinnuligi miðlatøkningur í Føroyum

ÚTBÚGVING
*Ingrid Bjarnastein*

23 ára gamla fuglafjarðar gentan, Bjørg Mohr Anderssen, hevur júst lokið útbúgving sum miðlatøkningur á Sjónvarpi Føroya. Ein miðlatøkningur tekur sær av fotografering, redigering, ljósi og ljóði.

– Mær dámar best at arbeiða sum fotografur, og tað er eisini tað, sum eg geri mest, men arbeiðið hjá mær fevnir um hasi fýra økini, greiðir Bjørg frá.

Bjørg hevur verið í læru í Sjónvarpi Føroya í fýra og eitt hálvt ár, harav hevur hon verið 55 vikur í Viborg, Danmark, í skúla.

– Eg taki mær av næstan øllum sendingunum her í húsinum. Dagur og vika, barnasendingar og aðrar sendingar, so eg eri í roynd og veru "all around", sigur Bjørg Mohr Anderssen.

– Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og sum miðlatøkningur hevur tú ábyrgd á næsta øllum økjum.

Sosialurin ynskir Bjørg hjartaliga tillukku við útbúgvingini, sum fyrsti og einasti kvinnuligi miðlatøkningur í Føroyum.



*23 ára gamla Bjørg Mohr Anderssen er fyrsta konufólk í Føroyum, ið hevur lokið útbúgving sum miðlatøkningur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eingin semja í væntu

**Dagrøktararnir í Kollafirði hava enn ikki tikið arbeiðið uppaftur, og eingin semja er í væntu. Einki nevnivert samband hevur verið millum partarnar**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Stefan í Skorini*



*Einki røkist fyri eini skjótari loysn á trætuni millum dagrøktarar í Kollafirði og Tórshavnar býráð. Álitiskvinnan Miriann Dam sigur, at einki veruligt samband hevur verið millum partarnar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Einki røkist fyri eini loysn í arbeiðsósemjuni millum dagrøktararnar í Kollafirði og Tórshavnar býráð í bræði.

Dagrøktararnir hava ikki verið til arbeiðis síðan síðstu viku, tá teir løgdu arbeiðið niður. Orsøkin var, at teir ikki høvdu nakran sáttmála við arbeiðsgevaran, sum í hesum førinum er býráðið. Tað var mikumorgunin, at dagrøktararnir í Kollafirði løgdu arbeiðið niður.

Miriann Dam, ið er álitiskvinna hjá dagrøktarunum, sigur, at hon onga hóming hevur av, nær arbeiðið verður tikið uppaftur. Tað vil siga, at støðan enn er óbroytt.

Partarnir hava havt samband um telefon fyri at tosa um, nær fundir skulu vera og onnur viðurskifti, men einki ítøkiligt er lagt á borðið.

## Ikki uppsagdir

Hóast býráðið boðaði teimum frá, at um tær ikki møttu aftur til arbeiðis, so vórðu tær sagdar úr starvi, so sigur Miriann, at tær ikki meta hetta sum eina uppsøgn.

– Vit hava ikki brotið nakrar setanartreytir, slær hon fast, og tær vilja sostatt ikki lata hetta um seg ganga.

Miriann sigur, at býráðið eigur at góðtaka, at dagrøktararnir eru limir í Kollafjarða Arbeiðarafelag, og at tær lata sítt limagjald til tað felagið og ikki til Starvsmannafelagið, sum býráðið heldur vil.

Hon heldur annars, at tað besta fyri dagrøktararnir hevði verið, um tær høvdu sítt egna felag fyri allar dagrøktarar í Føroyum.

## Onnur sama trupulleika

Onnur fakfeløg í økinum hava sama trupulleika við Tórshavnar býráð. Poul Øregaard, sum er formaður í Norðstreymoyar Handverkarafelag, sigur, at hansara felag hevur havt sama trupulleika eftir samanleggingina av Kollafjarðar og Tórshavnar kommunu.

Hann sigur, at teir limirnir í hansara felag, sum arbeiða hjá kommununi, verða noyddir at vera limir í Havnar Handverkarafelag. Kommunan sigur, at handverkarar í starvi hjá henni altíð hava verið limir í felagnum í Havn. Tí fer hon ikki at broyta tær mannagongdir, sum longu eru á økinum.

Poul Øregaard sigur seg víst sína ónøgd við hesi viðurskifti hjá kommunui, men at hetta er sum at sletta vatn á gás.

Talan er ikki um so nógvar limir, men Poul Øregaard sigur seg ver a keddan um missa limir vegna samanleggingina av kommununum.

# Stór framgongd í Sumba

**Í ár er mett, at inntøkan hjá sumbingum verður 38 milliónir. Men næsta ár fer inntøkan at veksa heilt upp í 46,7 milliónir, vísar metingarnar**

SUMBA
*Áki Bertholdsen*

Í Sumba er aftur stór framgongd at hóma.

Tað gekk sjón fyri søgn, tá ið bygdaráðið á fundi mánakvøldið viðgjørdi fíggjarætlanina fyri komandi ár.

Í ár verður mett, at samlaða stattagrundarlagið hjá kommununi verður 38 milliónir.

Men metingarnar hjá skattamyndugleikun um í Havn siga, at næsta ár fer inntøkan hjá sumbingum at veksa heilt upp í 46,7 milliónir.

Umframt hetta fer kommunan eisini at fáa onkrar smávegis leiguinntøkur næsta ár, eitt nú 12.000 fyri Sagverkið og 50.000 frá guanovirkinum og havnagjøldum í Lopra , umframt aðrar leiguinntøkur í Ónavík í Lopra uppá 50.000 krónur.

Nú fíggjarætlani n var til viðgerðar, varð skotið upp at skattaprosentið komandi ár skuldi vera tað sama sum í ár, 18%. Somuleiðis skuldi barnafrádrátturin verða óbroyttur, 4.000 krónur fyri hvørt barnið undir 18 ár.

Upplýst varð á fundinum, at tilsamans eru 98 børn í kommununi, sum barnafrádráttur verður latin fyri.

Tilsamans gevur hetta Sumbiar Kommunu eina inntøku av kommunuskattinum upp á 6,8 milliónir.

Í ár er skattainntøkan mett at geva 5,6 milliónir, so talan er um eina framgongd uppá heilar1,2 millión krónur.

Tá ið barnafrádráttur, botnfrádráttur og annað er drigið frá og lagt afturat, gevur hetta eina fíggjarætlan, sum javnvigar við 6.952.000 milliónum krónum.

Ein stórur partur av útreiðslunum eru lógarbundnar útreiðslur.

Men fyri at nevna nøkur fá tøl afturat, er ætlanin annars at seta 400.000 krónur av til bakkaverju at forða fyri, at brimið máar meiri burturav bakkanum afturat øllum tí, sum longu er farið. 200.000 krónur er ætlanin at seta av til nýggjar kloakkir í Sumba. Somuleiðis er ætlanin at umvæla skúlan í Sumba fyri 500.000 krónur og at byggja uppí skúlan fyri aðrar 500.000 krónur. Ì Lopra er eisini ætlanin at veita vatnið, sum rennur úr tunlinum, í vatnbrunnin í Lopra fyri at trygja húskum og vinnuvirkjum nóg mikið av vatni.



19 ára gomul:

# Skálvíksgenta kend reiðkvinna



*19 ára gamla Elin Tindskarð á hollendska "varmblods" hestinum*



*Ríðigreinin, ið Elin kappast í, eitur lop. Her avmyndað til eina kapping*

**Føroyska Elin Tindskarð, sum býr í Hirtshals í Danmark, byrjaði at ríða tá hon var fýra ára gomul. Hon hevur búð í Danmark alla tíðina hon hevur riðið, og í dag er Elin 19 ára gomul, og hon ríður framvegis**

RÍÐING
*Ingrid Bjarnastein*

Ríðigreinin eitur lop, og nærum hvørt vikuskifti luttekur Elin Tindskarð á stevnum runt um í Danmark og í Noregi. Ríðigreinin, sum Elin luttekur í, gongur út uppá at fáa hestin at leypa yvir nakrar forðingar, sum eru uppstillaðar á eina breyt.

– Eg venji minst fýra tímar um dagin. Meginparturin av míni frítíð fer til ríðing, sigur 19 ára gamla Elin Tindskarð.

Dagliga gongur Elin á studentaskúla í Hirtshals. Hon tekur tó bert nakrar einkultlærugreinar, soleiðis at hon fær betri tíð til at ríða.

## Góð úrslit

Stevnurnar, ið Elin Tindskarð luttekur á, eru runt um í Danmark.

Úrslitini hjá henni hava seinastu tíðina verið ógvuliga góð. Til dømis varð hon nummar tvey í einum meistaraskapi í Danmark fyri stuttum, og fyri umleið einum mánaða síðani varð hon nummar eitt til eina kapping í Noregi.

Hesturin, ið Elin hevur er ein hollandskur »varmblod«, sum tað eitur á donskum. Hesturin stendur í einum ríðistalli, bert fimm minuttir frá har, sum Elin býr.

– Tá eg ikki ríði eri eg saman við vinum ella í býnum. Tað er ikki nógv tíð til avlops, tí næstan øll tíðin fer til ríðing, og jú eisini vikuskiftini, sigur Elin Tindskarð at enda.


## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 626 2,2 cc GLX 5 hurðar
**Árg.:** 1991
**KM.:** 238,157
**Eyka útgerð:** El-rútar, sóltak, ALU-felgur

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Tlf. 373890
Fax nr. 373117
at hitta millum kl. 08[00]–10[00]
Magnus E. Joensen
Sýnsmaður


# Operatión Dagsverk

**Broyting:**

Vit skrivaðu í blaðnum í gjár, at Operatión Dagsverk-dagurin var settur at vera fríggjadagin tann 9. november.

Hetta er tó broytt nú, og verður dagurin mikudagin tann 7. november.

Til ber framvegis at fáa næmingar at arbeiða fyri seg, um áhugi er fyri tí við at ringja á telefon 250279 ella 258881.


## Aðal- og landsfundur Sjálvstýrisfloksins

**verður í Klaksvík**
**leygardagin 3. nov. 2001 kl. 13.00 í Skálanum**

Bussur koyrir av Farstøðini leygarmorgunin kl. 09.30. Skipað verður fyri farti um Leirvíksfjørð og til Havnar eftir fundin/veitsluna.

Tilmelding til veitsluna 215482 - 422430 ella 422292 í seinasta lagi 1. nov.

**Nevndin**